# Ungir rithøvun

## Johan Harstad,

*"Tá ið eg gangi úti, ígjøgnum býin, plagi eg at seta hetta næsta lagið á mín iPod – lagið fær nýggjar litir at koma fram í gerandisdegnum"*

*Ungur útvarpsvertur í tónleikasendingini "Løg mær dámar", Útvarpi Føroya mánakvøldið 24. juli 2006.*

*"... [Vit] fara syngjandi út í heim"*

*Uni Arge, Komin er nú onnur øld, s. 95.*

At tónleikur hevur nógv at siga fyri ung er ein eyðsýnd sannroynd í hesum tíðum.

Tónleikafestivalar er stóra tingið fyri tíðina, gomlu stevnurnar eru mest sum fyri einki hesa tíðina í nýggja ártúsundinum. Ungdómurin eigur lívið í teimum allarflestu festivalunum. Og hann er umringaður av tónleiki – í visuellu og útvarpaðu miðlunum; í lýsingum, filmar, alskyns sendingar, heimasíður hava flest allar tónleik um yvirskot er til tess, teldur og fartelefonir hava eisini innleiðandi tónar, tá ið hesar standa klárar til brúkarans tænastu.

Populer-tónleikur fyllir gerandisdagin hjá allarflestu ungdómum, fyri tey allarflestu er tað so, at ávísir sangir minna tey á løtur, støð, aðrar persónar osv... Populer-tónleikur hevur ein stóran leiklut fyri tann hoyrandi partin í ungdómsmentan, líkamikið hvar í verðini hon er.

Men á kensluliga økinum hevur tónleikur altíð havt sín fasta stað. Innanfyri sálarfrøðina er t.d. tónleikaviðgerð ein vælgrundaður táttur og ein vísindagrein. Heri Kragesteen, sálarfrøðingur, sigur, at tónleikur, sum hann sær tað, hevur møguleika at frambera ótrúliga nógv.

- Tað er ein máti at vera til uppá. Tað eru ofta tær stóru kenslurnar, sum eru frammi. Ein italienskur sálarfrøðingur hevur sagt, at eitt barn hevur 100 mál, men við tíðini taka vit 99 mál frá tí. Tónleikur er ein sera ríkur málbúni. Tað er heilt einfalt ein máti at vera til uppá.

Hann metir eisini, at tónleikur, bæði siðbundin og nútímans, fyllir ótrúliga nógv í føroyska samfelagnum.

Eg spyrji hann um hesar festivalarnar og um ung. Hví fara tey á festival – hvat dregur meiri tónleikur ella er tað meiri samveran? Hann peikar á trý stig, sum gera seg galdandi: 1. Tað heilt persónliga, ið fevnir um tað meiri persónliga, hvønn tónleik einum dámar, 2. so fer ein fyri at deila nøkur upplivilsir saman við teimum, sum ein kennir, vinfólki og líknandi. Og síðan er tað 3., sum ein kann kalla fyri "Totaluppliving". Ung hitta nýggjum fólkum, tey forelska seg og so víðari. – Festivalur er ein eksistensformur, ein máti at liva uppá.

Eftir bókmentatiltakið á G! Festivalinum hitti tveir ungar høvundar og spurdi teir um teirra forhold til tónleik sum høvundar.

- Onkuntíð lurti eg eftir eystur-evropeiskum technotónleiki, sum eg ordiliga hati, men hetta hjálpir mær av og á at skriva. Slíkt seti eg frá onkuntíð tíðliga onkrar dagar, tá er sovorðið gott!

**SAMTÍÐARGREIN**
*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*
*myndir: Rólant Waag Dam og Ole Wich*

Hetta púra óvæntaða svarið gevur norski høvundurin Harstad mær, tá ið eg havi spurt hann, um tónleikur fyri honum onkuntíð kann vera ein skaldligur íblástur. Hann er beinanvegin við uppá spurningin og skjótur at svara.

Harstad er í dag kendur høvundur í Noregi og bókin Buzz Aldrin hevur fingið nógva umrøðu í Noreg og eisini her heima, t.d. í OUTSIDERmagazin. Ungi høvundurin skrivar á norskum. Bókin hevur fingið eina góða móttøku eisini uttan í heimi, hon verður týdd til 11 mál – herímillum týskt, franskt, russiskt, føroyskt og seinni helst eisini enskt.

Í samrøðu við OUTSIDER-magazin fortelur Harstad, at m.a. kendu tónleikabólkarnir Radiohead og Sigur Rós hava verið íblástrarkeldur, meðan hann skrivaði Buzz Aldrin - Hvor ble det av deg i Mylderet?, sum fyri stóran part fer fram í Føroyum.

Tónleikur er eisini ein miðdepil í skaldliga lívinum hjá Harstad.

- Tá ið eg lurtaði eftir sanginum hjá Radiohead "How to disappear Completely" var tað ein avgerandi løta fyri skaldsøguna, Buzz Aldrin – eitt byrjunarpunkt. Tann sangurin liggur sum grund fyri hugskotinum í bókini. Tankin um at hvørva heilt er nakað, sum er viðkomandi fyri høvuðspersónin í bókini, Matthias. Og í Føroyum er tað jú ómøguligt at hvørva.

Og í hansara stuttsøgusavni, Ambulanse, sum kom út í 2002, hevur tónleikurin eisini ein ítøkiligan leiklut.

- Tá ið eg skrivaði ta bókina lurtaði eg nógv eftir eini útgávu hjá íslendsku Sigur Rós og í tí førinum fekk hendan tónleikaútgávan nógv at siga fyri bókina. Eg gjørdi brúk av stemninginum á tí fløguni til Ambulanse. Tað tekur umleið tað somu tíðina at lesa bókina, sum fløgan er long.

Tá ið talan er um Buzz Aldrin er tónleikaliga víddin nógv størri. Einhvør bók, sum Harstad skrivar, hevur so at siga eitt ljóðspor, fortelur hann. Í løgum finnur hann ofta fangandi og sterkar orðavendingar, persónslýsingar og huglag, sum hann ger brúk av.

- Onkuntíð fara tekstir ella vendingar, úr løgum eg lurti eftir, beinleiðis niður í tað, sum eg skrivi. Í norskum formi altso. Tá ið eg havi verið í Føroyum havi eg lurtað nógv eftir Eivør, Teiti, og Kára P.. Tað er ikki so, at eg dámi serliga væl tónleikin hjá Kára P. og eg skilji jú heldur ikki føroysku tekstirnar hjá honum, men har er nakað yvir tónleikinum, sum eg kundi brúka.

Tá ið vinfólk vitja Harstad og síggja hansara fløgusamling, hyggja tey oftast spyrjandi uppá hann. Hann viðgongur, at hann ofta lurtar eftir tónleiki, sum honum als ikki dámar. Og her nevnir hann hendan eystur-evropeiska technotónleikin.

Eisini rocktónleikur úr hesum økinum kann geva somu ávirkan.

– Tað kann vera gott at byrja dagin við – onkuntíð, leggur hann afturat.

Á bókmentatiltakinum á G! las Harstad úr seinnu helvtini av bókini. Hann fortaldi eisini frá, hvussu tað bar til, at hann kom hendan vegin. Ein gamal skúlavinur hevur familju í Kollafirði og so eitt kvøldið, eftir nøkur gløs av whisky, lovaði hann honum at skriva ta næstu skaldsøguna um Føroyar. Og so fekk hann møguleikan at koma higar. Hann hevur verið her 2-3 ferðir og sigur seg vera forelskaðan í landinum, hann finnur nógva inspiratión av ymiskum slagi her.

- Um ikki forlagið hevði givið mær forboð at skriva meiri um Føroyar, so hevði eg gjørt tað.

Harstad var á G! í fjør. Men tað var eitt minni væl eydnað kvøld, m.a. tí hann kom seint á festivalin og, at hann ikki visti nakað um, at einkarsøla av rúsdrekka var í landinum – kalt og veldig edrueligt, sum hann orðaði tað.

*- Tá ið eg lurtaði eftir sanginum hjá Radiohead "How to disappear Completely" var tað ein avgerandi løta fyri skaldsøguna, Buzz Aldrin – eitt byrjunarpunkt. Tann sangurin liggur sum grund fyri hugskotinum í bókini. Tankin um at hvørva heilt er nakað, sum er viðkomandi fyri høvuðspersónin í bókini, Matthias. Og í Føroyum er tað jú ómøguligt at hvørva.*

*Á tiltakinum lósu fylgjandi høvundar og yrkjarar upp: Thomas Boberg, Einar Már Gudmundsson, Jóanes Nielsen, Carl Jóhan Jensen, Eiríkur Ørn Norðdahl, Johan Harstad, Kim Simonsen og Vónbjørt V. Linjonsdóttir. Vónbjørt V. Linjonsdóttir er ikki við á myndunum*





